# Brúðleyp



Leygardagin 20. nov. giftast Heðin Ellingsgaard og Ulla Bundgaard í Nordby Kirke á Fanø.

Leygardagin 27. nov. giftast Sunnvá Tausen, Tórshavn og Dagfinn Olsen, Rituvík. Vígslan verður í Rituvíkar kirkju kl. 14. Opið hús verður á Svangasgarði, millum kl. 18.30 og 24. Øll eru hjartaliga vælkomin.



Leygardagin 4. des. giftast Jónvá E. Royðutoft, Strendur og Jónleif Eliasen, Tórshavn. Vígslan verður í Kelduni í Skálafirði kl. 13. Veitslan verður í bygdarhúsinum á Strondum kl. 18. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, vera biðin, at siga frá innan 20. nov. á tel.: 747825-447825 (Jónvá) ella 591310 (Jónleif)



Leygardagin 18. des. giftast Claudia Patricia Buzon Tesillo úr Kolombia og Jan Weihe av Skála. Vígslan verður í Skála kirkju kl. 15 og veitslan verður í bygdahúsinun í Leirvík kl. 19. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 30. nov. á tel. 441226 ella 221765



Leygardagin 1. jan. 2011 giftast Agnar Akraberg Poulsen og Sóleyð Elisabeth Petersen, Tvøroyri. Vígslan verður í Tvøroyrar Kirkju kl. 16. Veitslan verður hildin í høllini í Trongisvági kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga okkum frá innan 20. nov. á tlf. 599451 (Agnar) og 599450 (Sóleyð).



Týsdagin 28. des. giftast Tom Jacobsen úr Havn og Guðrið Johansen úr Miðvági. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 15 og veitslan verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 18. Tey, ið vilja gleða brúðarparið verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf.: 597714 eftir kl. 18 og á teldupost adr.: gudridjohansen@hotmail.com áðrenn 10. des. Bestu heilsur Guðrið og Tom




# Merkisdagar

## Gullbrúdleyp

Fríggjadagin 19. nov. hava Elisabeth og Páll Ellingsgaard gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Eiðisstovu sama dag frá kl. 8 til kl. 13. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Silvurbrúdleyp

Týsdagin 7. des. hava Joanita og Jan Jacobsen Saltangará silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skálafirði týsdagin 7. des. kl. 18. Tey ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 747547 áðrenn 3. des.

## 85 ára føðingardagur

Leygardagin 13. nov. fyllir Fía Olsen, Rituvík, 85 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá Herbert og Beintu í Rituvík frá kl. 17.

## 70 ára føðingardagur



Onsdagin 1. des. fyllir Marna Olsen, Vágur, 70 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 27. nov. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 60 ára føðingardagur

Týsdagin 16. nov. verður Jan Ellebye Andersen, Klaksvík, 60 ár. Dagurin verður hildin 20. nov. kl. 19 í kantinuni í Tekniska Skúla. Hjartaliga vælkomin.

## 60 ára føðingardagur

Tann 30. nov. fyllir Klæmint Skarðhamar, 60 ár. Í hesum sambandi verður opið hús í Sjónleikarhúsinum leygardagin 27. nov. kl. 18. Familja, vinfólk og kenningar! Verið vælkomin!




## *Jákup Haraldsen* *og familjan búgva í nýggjum og orkusparandi sethúsum í Sørvági.*

**Jákup, tú og Birna Haraldsen tit búgva í 180 fermetrar stórum húsum í Sørvági, skamt frá barnagarðinum.**

**Og tit hugsaðu um umhvørvið, tá tit fluttu inn í húsini í apríl mánaði 2008?**

– Tá vit fóru at byggja, vóru vit frá fyrstu løtu greið yvir, at vit vildu hava eina skilagóða orkuloysn sum bæði var orkusparandi og góð fyri umhvørvið. Eg kendi onkran, sum hevði fingið sær luft/vatn hitapumpu, og sum læt væl at.

## Í MORGIN




Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og ælingur, partvís kavi og hitin millum 1 og 4 stig.

## SUNNUDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og kavaælingur, men seinapartin minni vindur av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 0 og +3 stig.

## MÁNADAGIN




Fleyr til gul av umsum ættum, seinapartin fríska hann vindin av suðri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og regn av og á. Hitin millum 3 og 7 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ



**Síðstu nátt:**
Eitt stormlágtrýst, 964 hPa eystan fyri Skotland fer eystureftir.



**Komandi nátt:**
Millum lágtrýstið yvir Norðsjónum og ein hátrýstryg yvir Grønlandsfjørðinum rekur køld luft av norði máti Føroyum.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 127 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

3. nov Mánin næstur jørðini
6. nov Tendring
13. nov Fyrra kvarter
15. nov Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. nov | 11:30 | 23:39 | 10:30 | 22:39 | 10:45 | 22:54 | 00:55 | 13:30 | 01:55 | 14:30 | 09:45 | 21:54 |
| 13. nov | - | 12:14 | 11:14 | 23:49 | 11:29 | - | 01:39 | 14:14 | 02:39 | 15:14 | 10:29 | 23:04 |
| 14. nov | 00:49 | 13:22 | - | 12:22 | 00:04 | 12:37 | 02:49 | 15:22 | 03:49 | 16:22 | 11:37 | - |
| 15. nov | 01:56 | 14:15 | 00:56 | 13:15 | 01:11 | 13:30 | 03:56 | 16:15 | 04:56 | 17:15 | 00:11 | 12:30 |
| 16. nov | 02:35 | 14:52 | 01:35 | 13:52 | 01:50 | 14:07 | 04:35 | 16:52 | 05:35 | 17:52 | 00:50 | 13:07 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. nov | 08:45 | 20:54 | 11:45 | 23:54 | 00:10 | 12:45 | 11:15 | 23:24 | - | 12:30 |
| 13. nov | 09:29 | 22:04 | - | 12:29 | 00:54 | 13:29 | 11:59 | - | 00:39 | 13:14 |
| 14. nov | 10:37 | 23:11 | 01:04 | 13:37 | 02:04 | 14:37 | 00:34 | 13:07 | 01:49 | 14:22 |
| 15. nov | 11:30 | 23:50 | 02:11 | 14:30 | 03:11 | 15:30 | 01:41 | 14:00 | 02:56 | 15:15 |
| 16. nov | - | 12:07 | 02:50 | 15:07 | 03:50 | 16:07 | 02:20 | 14:37 | 03:35 | 15:52 |